

www.oljan.fo

**Jan Müller** 26 - 09 - 2011

# Almenn oljufeløg herða kappingina

Tað, sum veldur altjóða oljufeløgunum største høvuðbrýggið, tá hugsað verður um framtíðina, er tann avmarkaða atgongdin til nýggjar olju- og gassleiðir og tann veksandi kappingin frá almennum feløgum. Eftirspurningurin eftir olju og gassi veksur støðugt, men oljufeløgini hava ilt við at finna og at fáa atgongd til leiðir, sum kunnu koma ístaðin fyri tær, sum longu eru gagnnýttar. Í Miðeystri og Norðurafrika hevur tann politiski ófriðurin skert útboðið, samstundis sum almenn oljufeløg geva teimum stóru oljurisunum størri og størri kapping á altjóða marknaðinum. Samstundis leggur tann høgi prísurin trýst á feløgini fyri at nøkta tí veksandi eftirspurninginum, sum aftur kann fáa prísin í eina meiri støðuga legu. Ráðgevingarfyritan Ernst & Young hevur júst kannað, hvat oljufeløgini síggja sum ta størstu forðingina ella ta størstu avbjóðingina í komandi árum. Úrslitið vísir, at tann største avbjóðingin verður at fáa atgongd til nýggj leitiøki og at finna olju og gass, sum kann gagnnýtast. "Almenn oljufeløg geva altjóða feløgunum støðugt størri og størri kapping. Hetta er serliga galdandi í teimum økjunum, har orkutørvurin er serliga stórur, so sum Kina og India, tí har eru tey almennu feløgini farin at breiða sítt virksemi út um allan heimin", sigur norðmaðurin John Avaldsnes við Aftenposten. Hann er leiðari fyri teirri deildini hjá Ernst & Young, sum hevur til uppgávu at greina olju- og gassvirksemið í Evropa, Miðeystri, India og Afrika.